Toll- og Skattstova Føroya

# Deildarstjóri

Toll- og Skattstova Føroya er stovnur undir Fíggjarmálastýrinum.

Uppgávur stovnsins eru m.a. at fyrisita
- skattalógina
- tolllógina
- mvg-lógina
- kolvetnisskattalógina
- avgjaldslógirnar,

eins og alla skuldarinnkrevjing hjá landinum.

Stovnurin hevur 150 starvsfólk og er skipaður soleiðis, at planlegging og menning fer fram í Stýrinum á Argjum. Tær seks økisskrivstovurnar, ið eru á Tvøroyri, í Skopun, Sørvági, Tórshavn, Saltangará og Klaksvík røkja raksturin.

Í Stýrinum, har viðkomandi kemur at starvast, eru 30 starvsfólk.

Lýsingin finst eisini á heimasíðu okkara www.tollskatt.fo

E-mail: tollskatt@tollskatt.fo

Starvið sum deildarstjóri fyri Eftirlits- og innheintingardeildini í Stýrinum á Argjum verður hervið leyst at seta í seinasta lagi 1. apríl 2002.

**Høvuðsuppgávurnar eru m.a.:**
- dagliga leiðslan av deildini við ábyrgd yvir fyri stjórnini,
- umsiting og serkunnleiki í eftirlits- og innheintingarmálum,
- at gera og leggja til rættis vegleiðingar- og rundskriv um krøv til skattaroknskapin, meirvirðisgjaldsroknskapin, og tollfakligar spurningar í samband við eftirlit,
- at geva fakliga leiðbeining til økini í sambandi við roknskapareftirlit og innheinting,
- vinnugreinaeftirlit og grannskoðan av truplum málum og av málum, sum økini vegna lokalpolitiska orsøk ynskja at flyta til Stýrið,
- at undirvísa starvsfólkum í nýggjum reglum og arbeiðshættum í virkiseftirliti og innheinting
- at skifta upplýsingar við útlond,
- at gera úrvalsmøguleikar og hjálpiamboð til økini og
- at umsita og menna vegleiðing til samskipað eftirlit og innheinting.

**Førleikakrøv**
Vit kundu hugsað okkum, at tú hevur roknskaparliga útbúgving, eitt nú cand. merc. ella aðra hægri roknskaparella revisiónsútbúgving. Tú skalt hava góð leiðaraevnir, kunna arbeiða saman við øðrum og eisini sjálvstøðugt. Arbeiðsroyndir við tolli-, mvg- og skattamálum er ein fyrimunur.

**Vit kunnu bjóða**
Eitt spennandi starv við nógvum avbjóðingum, sum samstundis eisini er fakliga krevjandi og við møguleikum fyri eftirútbúgving, v.ø.o. eitt sjálvstøðugt starv í góðum arbeiðsumhvørvi, har tú sjálv/sjálvur leggur dagliga arbeiðið til rættis.
Vit hava flextíð á arbeiðsplássinum.

**Setanartreytir**
Starvið verður lønt eftir sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarandi fakfelag.
Núverandi setanarøki er í Stýrinum á Argjum, men fevnir annars um aðalstýrini, løgmansskrivstovuna og deildir teirra, og tann, ið settur verður, skal kunna røkja tænastur á hesum støðum, um tað verður kravt.

Á eftirlitsdeildini eru í løtuni 4 starvsfólk, sum tú kemur at hava eitt tætt samstarv við.

**Nærri frágreiðing um starvið** fæst við at venda sær til Stýrið, Regin Thomsen ella Óla Heinesen, tlf. 35 26 00.

**Umsóknir:** Umsóknir við avriti av prógvum og upplýsingum um viðkomandi starvsroyndir skulu vera Stýrinum í hendi í seinasta lagi

**25. februar 2002**

Toll- og Skattstova Føroya
Stýrið
Postsmoga 2151
FO-165 Argir


Sosialurin
Sosialurin
i


UNITED seafood

# Skrivstovunæmingur

Við hesum verður søkt eftir skrivstovunæmingi til Føroya Fiskavirking á Tvøroyri, at byrja 1. mars 2002. Føroya Fiskavirking, Tvøroyri framleiður feskar og frystar fiskavørur til kundar í Evropa og USA.

**Krav er at umsøkjari hevur:**
- Antin FHS-, HH-, HF- ella studentsprógv

**Fyrimun hevur umsøkjari, ið eisini hevur:**
- Góðan førleika í enskum máli
- Kunnleika til teldunýtslu

**Vit kunnu bjóða:**
- Eitt framkomið fakligt umhvørvi
- Eitt virkið og framkomið framleiðsluumhvørvi
- Løn sambært lærlingasáttmála

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Bjarna Hansen, virkisleiðara, tlf. 371436.

Umsóknin skal sendast áðrenn 18. februar 2002 til:

**UNITED SEAFOOD**
**P/F Føroya Fiskavirking Tvøroyri**
att.: Bjarni Hansen
Postboks 30
FO–800 Tvøroyri

Føroya Fiskavirking er eitt felag, sum í dag eigur 7 fiskavirkir.

Vit keypa fisk frá føroyskum skipum og bátum – at virka á okkara virkjum. Eisini keypa vit bæði feskan- og frystan fisk frá útlendskum skipum til virkingar.

Á virkjum okkara framleiða vit í dag:
- Frystar vørur beinleiðis til brúkarar í Evropa og USA
- Frystar vørur til matvøruídnaðin í Evropa og USA
- Feskar vørur beinleiðis til brúkarar í Evropa
- Feskar vørur til matvøruídnaðin í Evropa
- Saltfisk til brúkarar í Evropa

Fyri at tryggja góðskustøðið og matvørutrygdina eru á øllum virkjum okkara egnar góðskudeildir, sum framhaldandi kanna vøruna. Øll virkir okkara arbeiða eftir HACCP skipanini. Søludeild okkara er marknaðarrættað við høgum støði av serkunnleika viðvíkjandi vørukunnleika, -logistikki og - marknaði.

Krøv kundans verða sett í hásæti, eins og nøgdirnar av feskum-, frystum- og saltaðum fiskavørum, vit framleiða og selja, gera, at kundar okkar bæði í Evropa og USA meta, at teir altíð kunna fáa tørv sín nøktaðan best møguligt hjá okkum. Fiskasløgini, sum vit fyrst og fremst arbeiða, eru: Upsi, toskur, hýsa, svartkalvi og kongafiskur.


# Nýggj sólmiðstøð við lágum prísum




4 sólir í Føgrulíð 16
20 kr. fyri hvørja ferð
Opið frá
kl. 07.00 til 23.00




# Pedagogur og hjálparfólk

Søkt verður eftir einum pedagogi 40 tímar um vikuna, at byrja 01.04.2002. Starvið er tíðaravmarkað til 31.12.2002 (fyri pedagog, ið er í barnsburðarfarloyvi).

Søkt verður eftir einum hjálparfólki 40 tímar um vikuna, fyri hjálparfólk, sum er í farloyvi frá 01.03.2002 til 28.02.2003.

Barnagarðurin við Velbastaðvegin er sjálvsognarstovnur og normeraður til 60 børn í aldrinum 3 – 7 ár, býtt sundur í 3 stovur.

Á hvørjari stovu starvast tveir pedagogar og eitt hjálparfólk.

Tann, ið settur verður, skal hava góð samstarvsevnir, vera kreativur, skal kunna arbeiða sjálvstøðugt og duga at síggja møguleikarnar í okkara náttúrumhvørvið saman við børnunum.

Løn og setunartreytir eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Føroya Pedagogfelag.

Umsøkn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum, skal vera Barnagarðinum í hendi í seinasta lagi 22.02.2002 kl. 12[00].

Nærri upplýsingar um størvini fáast við at venda sær til leiðaran á tlf. 314373.

**Barnagarðurin við Velbastaðvegin**
Velbastaðvegur 41
FO–100 Tórshavn

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. P/F 3273, P/F Jákup Sune Jacobsen, 100 Tórshavn.

Nevnd:
Innkomin í nevndina:
Martin Pauli Djurhuus Jacobsen, Fugloyarvegur 100 Tórshavn og EdilMaria Djurhuus Jacobsen, Strynøgade 11, 3 sal, DK-9000 Ålborg.

Skráseting Føroya tann 6. februar 2002

Kristin Balle

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. P/F 572, P/F Meðalsbrekka, 350 Vestmanna.

Viðtøkur broyttar: 09.10.2001.
Nýtt hjánavn: P/F Seglhúsið í Vestmanna (P/F Meðalsbrekka)

Skráseting Føroya tann 6. februar 2002

Kristin Balle

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. P/F 293, P/F Poul Michelsen, 100 Tórshavn.

Viðtøkur broyttar: 17.01.2002.
Nevnd:
Farin úr nevndini: Arnfinn Norðfoss, Grásteinsgøta 8, 100 Tórshavn.
Innkomin í nevndina: Gunnar D. Mohr, Blákollugøta 3, 100 Tórshavn.
Tekningarreglur: Felagið verður bundið av stjóranum ella av nevndarformanninum.

Skráseting Føroya tann 6. februar 2002

Kristin Balle


Í BÝIN
hvønn hósdag !


## HEILSANIR



**Birgit Thorssteinsson, Søldarfirði**
Hjartaliga tillukku á 5 ára degnum 5. februar. Vit elska teg.
**Omma, abbi og Perla**



**Birgit Thorsteinsson**
Góða systir, hjartaliga tillukku á 5 ára degnum týsdagin 5. februar ynskja **beiggjarnir, Allan, Niels Juul, Georg og Pætur**



**Góðu Jan og Tóki!**
Hjartaliga tillukku við 22 og 5 ára føðingardøgunum ynskja
**mamma og babba**



Hævnen er sød! Góða Guðrun, tillukku við 23 ára degnum. Her ert tú fitt. Tað klæðir tær at hava horn.
**Heilsan, systrar og svágrar**



**Góði Pól Eyðfinn**
Tillukku við 2 ára føðingardegnum ynskja
**omma og abbi**



**Birgit Thorsteinsson**
Okkara elskaða dóttir, tær verður ynskt hjartaliga tillukku á 5 ára degnum 5. februar. Jesus pápi veri hjá tær.
**Mamma og babba**



**Góða, elskaða dóttir**
Hjartaliga tillukku við 18 ára degnum 6. febr. Alt gott verður ynskt tær í framtíðini.
**Heilsan, mamma og Jan**

**Góða Jonna**
Hjartaliga tillukku við 18 ára degnum 6. febr. Vit gleða okkum til ballið fríggjakvøldið.
**Heilsan, Hans Jákup, Paula, Kristina, Sigurbjørt og Halldórur**



## Heilsanir

30,- kr. Sosialurin

**5 ferðir um vikuna**

### Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑ Leygard.

Tekstur:..............................................................
..............................................................
..............................................................
..............................................................
..............................................................
..............................................................

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.
Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: ..............................................................
Bústaður: ..............................................................
Bygd/býur: ................................... Tlf.: ................

Sendið lepan, mynd og gjald til:
**Sosialurin**
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: »**Heilsanir**«